# Undangongumaður, ungdómsleiðari og nordistur 50 ár

Í dag fer Hallstein Sigurðsson í Havn um tey fimmti árini. Hallstein er ættaður úr Klaksvík, men seinastu mongu árini hevur hann verið búsettur í Havn. Árini 1981-2000 var Hallstein ein sonn býarmynd, tá hann var postmaður í tí nú farna almenna stovninum, sum tá nevndist ”Postverk Føroya”.

Í 19 ár tænti Hallstein Postverkinum á postrutum í Havn, Hoyvík og í Norðurstreymoy. Hallstein greiddi sín arbeiðssetning til lítar, um enn sosiala muran vann ov ofta á honum, og kaffisteðgirnir tíðum kundu gerast í drúgvara lagi. Men tað er eisini mong á rutunum, sum vóru glað fyri at fáa eitt gott prát við Hallstein, har bæði verðinsproblemini og teir heimligu trupulleikarnir vóru loystir.

Í tí drúgvu postverkstíðini vísti Hallstein eisini stórt samhaldsfestni, og var hann ógvuliga aktivur í ”Føroya Postfelag”, sum eisini er farið í søguna. Hallstein var postmonnunum í Suðurstreymoy ein góður álitismaður, altíð væl funderaður og sakligur, og kundu leiðsla eins væl og starvsfelagar altíð taka í hondina á Hallstein, tá eitthvørt stríð var farið afturum. Soleiðis broytist so mangt á mansins ævi. Og er tað rørandi – og skelkandi - fyri ein fyrrverandi postmann at lesa greinina sum Høgni Mohr, orðasnillingur skrivaði um Hallstein, tá hann gekk sína seinastu postrutu fyri 9 árum síðani. Hetta var í teimum døgum, tá postboðið kendi viðskiftafólkini, og viðskiftafólkini kendu postboðið. Men so komu boð frá…………og nú er alt bert minnir.



*Seinastu níggju árini hevur Hallstein Sigurðsson staðið fyri útberingini av Sosialinum, Dimmalætting og reklamum hjá Prentmiðstøðini. Men fyri ta tíð var hann í 19 ár postboð í Havn og í Norðurstreymoy. Á myndini sæst hann »in action« í Kvívík*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### FUR og norðurlond

Í samband við sín aktiva leiklut í Føroya Postfelag var Hallstein á nógvum skeiðum, sum fakfelagið skipaði fyri, bæði í Føroyum og í Danmark. Hesi skeið vóru við til at menna Hallstein til at gerast tann leiðara og undangongumann hann er í dag.

Politiskt hevur Hallstein frá tíðarinnar morgni verið javnaðarmaður, men ikki ein fundamentalistiskur, forstokkaður javnaðarmaður, men ein javnaðarmaður, sum kann samskifta væl við øll. Hallstein gjørdist formaður í Føroya Ungdómsráði, sum hann stýrdi við hepnari hond í 1980-árunum. Tann størsti varðin sum stendur um formanstíðina hjá Hallsteini í FUR, er plátan ”Ung 85” sum kom út í 1985, har ymiskir tónleikabólkar sum vóru frammi í tíðini tá sungu og spældu.

Hallstein royndi seg eisini eitt tíðarskeið, sum managari hjá bólkinum ”Frændur”, sum hevur verið næstan hvørsmans ogn í Føroyum seinastu fjórðingsøldina. Hallstein hevur eisini stillað upp til bæði løgtingsval og býráðsval fyri Javnaðarflokkin, og hevur hann tikið nøkur tørn í býráðnum, sum varamaður.

Tíðin í FUR elvdi til at Hallstein eisini kom at vera ógvuliga virkin í norðurlendskum ungdómssamstarvi. Eitt tíðarskeið sum skapti grundarlag fyri, at Hallstein seinni gjørdist virkin í Norrøna Felagnum, har hann hevur verið bæði formaður og nevndarlimur. Hallstein hevur havt samband við nógvar norðurlendskar politikkarar, og er tað næstan so, at hann nevnir teir flestu við fornavni, so ein má spyrja hvønn Hallstein hvønn norðurlendskan politikkara hann meinar við, tá hann sigur ”Jens”, ”Torbjørn”, ”Sif” o.s.fr..

### Prentmiðstøðin

Á heysti í 2000 valdi Hallstein at saðla um og skifta hest. Hann var settur til at skipa fyri blað- og reklamuútberingini á Prentmiðstøðini. Prentmiðstøðin hevur nú 9 ár á baki, og hevur Hallstein saman við øðrum góðum fólkum bygt hesa útberingina upp frá scratch. Royndirnar frá samskipan í FUR o.ø felagsskapum, og royndirnar frá skeiðum, og lívsroyndir í síni heild hava roynst Hallsteini góðar á Prentmiðstøðini.

Ein útbering við fleiri hundrað fólkum, harav fleiri eru ”blað”ung verður væl ongantíð lýtaleys, men Hallstein og hansara fólk hava hingið væl í, fyri at fáa greitt setningin frá degi til dags. Prentmiðstøðin hevur eisini lagt góðar krónur í kassan hjá Sosialinum og Dimmalætting. Sum Hallstein sjálvur sigur:

”Prentmiðstøðin hevur verið góð fyri demokrati´ið í Føroyum.” Tí demokratur og nordistur er Hallstein um ein hals, og hann hevur ein sterkan rættvísissans. Hallstein eigur sonin, Trónd Sigurðsson, sum hann ikki er so lítið stoltur av. Vit sum hava havt Hallstein, sum ein góðan vin og starvsfelaga, kunnu ikki annað enn ynska honum hjartaliga tillukku við tí hálvu øldini, og eina góða og stuttliga veitslu fríggjakvøldið.

**Heri Simonsen**




**HJÁLP TIL AT FESTA HUGSAN Á BLAÐ**

Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Fært tú ikki tikið teg saman?**

Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin

"Nøvn í vikuni"
Tel.341800 / 216135
Teldupost: maggi@sosialurin.fo


## Tøkk

Av hjarta takka vit øllum, ið sýndu samkenslu,
tá elskaði pápi, abbi, beiggi og verpápi

**Tróndur F. Olsen**

andaðist og varð jarðaður.

Takk fyri heilsanir, blómur, kransar og peningagávu.
Takk fyri alla hjálp til jarðarferðina, ervið og tey,
ið fylgdu honum til hansara síðsta hvíldarstað.
Eisini ein tøkk til starvsfólkini á B6, B7 og til heimasjúkrasystrarnar fyri at vera so nógv um hann.
Ein serlig tøkk til Øssur, sum var so trúfastur vinur.

**Eigil, Nadja, Dan Helgi, Ørvur, Paula, Niclas, Finnur, Hjarnar og Brian**

†

Sunnudagin andaðist

**Árni Joensen**
**Klaksvík**

á Landssjúkrahúsinum, 58 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi
mikudagin kl. 18.00.

Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni
hósdagin kl. 13.30.

*Familjunnar vegna*
**Rannvá og børnini**

Tey, ið ynskja at minnast Árna, kunnu lata eina peningagávu til Føroya Krabbameinsfelag.